Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Shell 80 ár á baki í Føroyum

**Fríggjadagin 27. mai eru 80 ár liðin, síðani fyrsta tunnan av olju frá Shell varð seld í Føroyum. Fyrsti Shell-umboðsmaður í Føroyum var Christian Holm Jacobsen, og fyritøkan I.P. Evensen & Søn keypti fyrstu tunnuna**

TÍÐINDASKRIV



*Kendi vinnulívsmaðurin, Christian Holm Jacobsen, var fyrstur at selja olju frá Shell í Føroyum. Hann seldi fyrstu tunnuna í 1925, og hann gavst sum Shell-umboð í 1953.*




*Hákun Djurhuus, stjóri, og Erling í Liða, sølustjóri hjá Føroya Shell, á tíðindafiundi í Hotel Føroyum mikudagin. SHELL stóð málað við stórum stavum á tekjuni á tunnugoymsluni hjá Christiani Holm Jacobsen á Viðarnesi, á leið har sum P/F Føroya Shell hevur høvuðsskrivstovu í dag.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

"Den første Tønde blev solgt til I. P. Evensen 27/5 - 1925", stendur at lesa í uppskrivingarbókini, Salgsstatistik, hjá Christiani Holm Jacobsen, ið sum tann fyrsti fór undir at selja olju frá Shell í Føroyum.

Tað byrjaði við einari tunnu av olju í 1925, og í dag - 80 ár seinni - er talan um eina landsfevnandi fyritøku, P/F Føroya Shell, sum undir nútímans umstøðum veitir privatum viðskiftafólkum, tí almenna og vinnulívinum bæði á sjógvi og landi tænastur.

Fyrsta árið - frá 27. mai til 31. desember 1925 - seldi Christian Holm Jacobsen samantalt 957 tunnur av olju frá Shell til føroyingar fyri tilsamans 50.304,52 krónur. Tað gekk skjótt framá at selja Shell-olju í Føroyum. 10 ár seinni - í 1935 - var árliga sølan 13.443½ tunnur, stendur í uppskrivingarbókini hjá Christiani Holm Jacobsen.

Hann hevði tikið kappingina upp við Det Danske Petroleums Aktieselskab, DDPA, sum frammanundan var umboðað í Føroyum, og sum seinni bleiv til Esso.

Christian Holm Jacobsen umboðaði Shell umvegis A/S Dansk-Engelsk Benzin og Petroleums Co., sum Shell í Bretlandi átti meginpartin av, og sostatt vóru tað tey fyrstu árini í føroyskari oljusøgu hetta felagið og DDPA, sum kappaðust á føroyska marknaðinum.



*Á fyrstu síðu í eini gamlari uppskrivingarbók hjá Christiani Holm Jacobsen stendur, at fyrsta tunnan av olju varð seld til I. P. Evensen tann 27. mai 1925. Tað gekk við rúkandi ferð at selja Shell-olju í Føroyum, eftir at 957 tunnur vórðu seldar fyrsta árið - í 1925. 10 ár seinni - í 1935 - var árliga sølan komin upp á 13.443½ tunnur.*

## P/F Føroya Shell

Oljutunnurnar, sum vórðu innfluttar, vórðu skipaðar upp á sonevndu Shell-brúnna, sum nú liggur undir Vestaru Bryggju. Fyrst í tríatiárunum varð útbygt við oljutangum á Viðarnesi og aðrastaðni kring landið, og 17. oktober 1934 kom tann fyrsti oljufarmurin, sum varð fluttur við tangaskipi, til Føroyar. Christian Holm Jacobsen hevði eisini tunnugoymslu á Viðarnesi, har høvuðsskrivstovan hjá Shell er í dag.

Krígsárini - 1940-1945 - tryggjaði Ministry of Fuel í London føroyingum olju. Shell í London og Shell-umboðið í Føroyum bóru so í bandi, at føroysk viðskiftafólk hjá bæði DDPA og Shell fingu so nógva olju, sum teimum tørvaði.

Christian Holm Jacobsen gavst sum umboðsmaður hjá Shell í 1953, og tá varð Shell í Føroyum umskipað til eina deild undir A/S Dansk Shell.

Shell í Danmark setti Conrad Joensen sum stjóra í Shell í Føroyum 1. januar 1954, og hann sat sum stjóri, til Hjarnar Djurhuus tók við stjórastarvinum í 1969. Hjarnar Djurhuus tók stig til at skipa Shell í Føroyum sum sjálvstøðugt føroyskt partafelag, P/F Shell í 1973. 20 ár seinni - 1. januar 1992 - varð hetta navnið broytt til P/F Føroya Shell fyri at leggja dent á, at talan er um eitt sjálvstøðugt føroyskt felag í tí heimsumfatandi Shell Group. Hjarnar Djurhuus var stjóri í P/F Føroya Shell til 1997, tá núverandi stjórin, Hákun Djurhuus, setti seg í stjórastólin á Viðarnesi.

## Umfatandi virksemi

Sum árini eru liðin, er virksemið hjá Shell í Føroyum nógv víðkað. Felagið bygdi sína fyrstu Shell-støð á Frælsinum, og hon læt upp ólavsøkuaftan 1970. Í dag eru 10 Shell-støðir kring landið og átta Shell-avgreiðslur, har fólk kunnu bíleggja olju og fáa fatur á hitatænastuni, um tað er vorðið øskukalt.

14 tangabilar koyra oljuna hvønn dag um allar Føroyar. Shell innflytir oljuna við egnum skipi, og hon verður flutt til oljugoymslurnar, Shell-støðirnar, latin í tangar hjá húsarhaldum, koyrd umborð á skipini o.s.fr.

Shell-støðirnar hava stórt úrval av gerandisvørum, og Shell-netið í Føroyum er soleiðis skipað, at Shell er nær viðskiftafólkunum í gerandisdegnum og harvið kann veita so skjóta og góða tænastu sum gjørligt á øllum økjum.

Sum sjálvstøðugt felag virkar P/F Føroya Shell dagliga á jøvnum føti við eitt nú Shell í Danmark, Svøríki, Týsklandi og øðrum stórum londum í samtakinum Shell Group. Hetta hevur við sær, at felagið hevur eitt heimsumfatandi netverk við m.ø. serkunnleika og serfrøðingum at dúva uppá. Talan er um vitan, sum umvegis P/F Føroya Shell verður flutt hendanvegin, og sum eisini gagnar føroyska samfelagnum.

Ein tunna í 1925 bleiv sostatt til eitt umfatandi virksemi og sølu í milliónatali av oljulitrum 80 ár seinni. Í 2004 seldi P/F Føroya Shell tilsamans 165.731.000 litrar av olju. Tað er umleið ein millión tunnur.



*Fyrsti oljufarmurin, sum varð fluttur við tangaskipi, kom til Føroya 17. oktober 1934. Tað var við tangaskipinum, Freshmoor. Frammanundan varð oljan flutt í tunnum.*




*Bilarøðirnar vóru langar, tá fyrsta Shell-støðin læt upp á Frælsinum í Havn ólavsøkuaftan 1970. Støðin hevði fyrstu bilvaskimaskinu í Føroyum.*